# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Kendir tvíburðar fylla 50 ár

Í dag, hósdagin 4. august, eru tað hálvt hundrað ár síðani, at tvíburðarnir Ásmund og Trond Nolsøe vóru bornir í heim. Teir vóru í glæsiliga tíðarskeiðnum hjá TB í sjeyti og áttati árunum millum mest eyðsýndu framrættaðu spælararnar, og tað eru framvegis mong, sum minnast dámligu tvíburðarnar á TB liðnum.

Teir eru uppvaksnir á Húsgarði í Trongisvági. Foreldrini eru Jonna, fødd Strøm, og Petur Nolsøe. Petur doyði í 1985. Børnini hjá teimum eru Heri, sum doyði í 1986, Sigmund, Pauli og Trond, sum allir búgva í Trongisvági, Ásmund, sum býr á Sevmýri og Heðin, sum býr niðri.

Trond lærdi til krambarkall hjá Poul Arna Poulsen, og seinni hevur hann arbeitt í Húsbúna og sum portørur. Hann eigur tveir dreingir - Vagnur og Páll Heri. Mamma teirra er Adeley Kjærbech á Tvøroyri.



*Trond og Ásmund Nolsøe*

Ásmund lærdi til bakara bæði í Havnini og síðani á Tvøroyri. Hann hevur eitt nú arbeitt hjá Richard Thomsen og havt fitnessmiðstøð í ítróttarhøllini í Trongisvági. Nú er hann í hálvtíðar starvi sum gartnari á sjúkrahúsinum, og so vaskar hann á flakavirkinum.

Ásmund er giftur við Annu Djurhuus á Tvøroyri. Hon átti Heidi, og hini børnini eru Gudrid og Rasmus.

Fryntligu tvíburðarnir høvdu góð fótbóltsevnir. Tað vístu teir sum smádreingir í Trongisvági, og tá ið teir seinni hættaðu sær út á Sevmýri og komu á yngru liðini hjá TB, sum vunnu fleiri FM um hetta mundið. Í 1968 var TB meistari í piltadeildini, og í 1970 og í 1971 var TB føroyameistari í dreingjadeildini og bæði árini eisini steypavinnari.

Nógvu sigrarnir boðaðu frá, at góðir árgangir vóru ávegis í TB, og millum teirra við fótbóltsinnliti kom tað ikki óvart á, at TB frá miðskeiðis í sjeyti árunum og næstu nógvu árini var við til at mynda toppin í føroyskum fótbólti.

Á góða gullliðnum var beiggi tvíburðarnar, Sigmund, millum teir stinnastu í verjuni. Tvíburðarnir vóru fyri tað mesta í álopinum. Teir dugdu væl við bóltinum, teir vóru skjótir, teir vóru málsóknir, og teir høvdu serliga góða innanhýsis fatan fyri fótbóltsspælinum.

Fyrstu FM heitini í fremstu deildini vóru teir við til at vinna í 1976 og í 1977. Hetta seinna árið vann TB avgerandi dystin móti HB 3-0 í Gundadali, og Trond skoraði øll trý málini. So vóru teir meistarar í 1980 og aftur í 1987. Í 1977 vunnu teir Ísafjarðarsúluna. Einar fimm ferðir endaðu teir báðir og TB á næstfremsta plássinum í landskappingini. Trond, sum nú er ein av monnunum á TB beinkinum, gavst at spæla í fremstu deildini síðst í áttati árunum, og Ásmund gavst fyrst í níti árunum. Seinni hugnaðu teir sær í 5. deild og í oldboys.

Bæði Ásmund og Trond vóru á landsliðnum. Hetta var frammanundan, at føroyskur fótbóltur fekk altjóða viðurkenning í 1988. Trond umboðaði Føroyar fýra ferðir, og Ásmund umboðaði Føroyar sjey ferðir, og í teimum dystunum skoraði hann fimm mál. Fyrsti landsdysturin hjá teimum báðum var, tá ið Føroyar 30. juni í 1980 spældu á Akureyri móti Íslandi, sum vann 2-1. Tveir dagar seinni spældu Føroyar í Suðarkróki móti Grønlandi. Úrslitið var 6-0, og Ásmund skoraði trý mál.

## Tøkk

Øllum tykkum sum á ymsan hátt mintust meg á 80 ára degi mínum takki eg hjartaliga.

**Vinarligast**
**John Hammer**

# BILATORGIÐ

**Føroyski brúktbilamarknaðurin - í Sosialinum hvønn hósdag**



**FORD GRANADA 2,3L V6**
Árg. 1985 - Km. 249.500 - Kr. 5.000
Bilurin er í góðum standi, hevur koyrt nógv í útlandinum.
Bert ein eigari. Væl egnaður sum ellisakfar.
**TEL. 320456**



**OPEL ASTRA 2,0 DTI ELEGTANCE DIESEL**
Árg. mars 1999
Klimaanlegg, el-síðurútar, el-síðuspegl, 4-airbag, radio v.CD, servostýring, infrareytt, ABS-bremsir, træ-look innan, veloursetur, armlen og alufelgur.
Bilurin er í fínasta standi. Tú gert kvetti.
**TEL. 315377 ella www.handil.fo**



**FORD MONDEO 1,8 AUTOMATIC**
Árg. 1994 - Km. 93.700 - Kr. 35.000
Bilurin er væl hildin og í fínasta standi.
**TEL. 320456**



**MERCEDES C180 ELEG.**
Leður/klima, km 194.000,
árg. Sept 1995
kr. 169.000
Sertilboð uttan bil í býti
kr. 125.000



**CITROEN XANTIA 2,0HDI**
Km 103.00 Apr. 1999
kr. 110.000 sýnaður 04
Sertilboð uttan bil í býti
kr. 90.000



**VW PASSAT 1,6I**
Km. 112.000
Árg. Apr 1997
kr. 85.000
Sertilboð uttan bil í býti
kr. 70.000



**TOYOTA AVENSIS 2.0D4-D 4H**
Km. 72.000
Árg. Mar 2001
Kr. 140.000
Sertilboð uttan bil í býti
kr. 120.000



**VOLVO S60 2.4I SEDAN**
Km. 60.000 Árg. Sep 2001
Kr. 265.000 sýnaður 04-05
Sertilboð uttan bil í býti
kr. 230.000



**BMW 318TDS 5H**
Km. 146.000
Árg. aug1997
Kr. 125.000
Sertilboð uttan bil í býti
kr. 105.000,00



**CITROEN C3 1.4HDI PRESTIGE**
km 66.000 Aug. 2002, kr. 120.000
Sertilboð uttan bil í býti
kr. 100.000



**CITROEN XSARA 2.0HDI SX A/C**
km. 118.000. Árg. Apríl 2000
kr. 110.000.
Sertilboð uttan bil í býti
kr. 95.000

CITROËN Mercedes-Benz MITSUBISHI
**Ivan Johansen Bilar**
Tel 313666 • www.ivan.fo •e-mail: ivan@ivan.fo
DANAK DNV